


*Tríggir forkunnugir bilar hjá Havnar Bilasavni: Bentley SII frá 1960, Ford A frá 1930 og Chevrolet Styline frá 1950 - alt sera snotuligir bilar, sum eru væl egnaðir til eitt nú brúðarkoyring*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

## Havnar Bilasavn:

# Hava bilin til eitthvørt høvi

**Skalt tú giftast, halda polterabend – ella tá Bill Clinton kemur á vitjan, so hevur Havnar Bilasavn bilin kláran. Felagið hevur 12 ellisakfør, sum umboða alla farnu øld**

**ELLISAKFØR**

Magnus Gunnarsson
maggi@sosialurin.fo

Havnar Bilasavn er navnið á nýggjum felag, sum hevur til endamáls at eiga og leiga út ellisakfør. Felagið hevur keypt øll ellisakførini hjá Vatnsoyrar Bilasavni - og hevur sostatt størsta og forkunnugasta bilasavnið í landinum.

Tað eru Heini á Borg og Eirikur Lindenskov í Havn, sum eiga nýstovnaða felagið. Teir eru báðir bilavandir og hava fingist við ellisakfør í mong ár. Teir eru eisini fastir fúsir í Føroya Ellisakførum, sum er áhugafelagið hjá teimum, sum fáast við gamlar bilar og motorsúkklur.

– Nú tá tað stóð okkum í boði at keypa allar bilarnar hjá Hans Elmari Poulsen á Vatnsoyrum aftur at teimum, vit høvdu frammanundan, so tóku vit kjansin, siga teir báðir.

Ætlanin er, at felagið skal leiga bilarnar út til ymisk høvi. Teir verða kortini bert leigaðir út við førara.

Tann elsti bilurin í savninum er eisini tann elsti bilurin í landinum. Tað er ein Ford T frá 1915. Hetta er ein opin bilur við kalesju – eins og tann hjá Bedstemor And. Talan er um ein sokallaðan Messingford -–tað eru teir Fordarnir, sum vórðu framleiddir áðrenn USA fór upp í seinna heimsbardaga. Kølari, lyktir o. a. var gjørt úr messingi, men tá USA fór í kríggj í Evropa, mátti alt messing nýtast til vápnaídnaðin. Hesir "Messingfordarnir" eru m. a. sermerktir av teirri orsøk.

Fyrsti bilurin, sum kom til Føroya, var ein Ford T – ein eitt tons lastvognur frá 1922.

Tann næstelsti bilurin er ein Ford A frá 1930. Talan er um ein Town Sedan – tað merkir, at hann hevur fýra hurðar. Hesir bilarnir eru í dag nógv meira sjáldsamir, enn teir við tveimum hurðum. Ein orsøk er, at hann er bygdur upp úr træi, meðan tann tveyhurðaði hevur jarnkarrossarí eins og nýggjari bilar. Alt húsið og hurðarnar hevur trækonstruktión og er so klætt við jarni.

Tann næsti er ein Chevrolet er frá 1931. Hesin minnir rættiliga nógv um Ford A, men hevur størri motor og orkar tískil rættiliga nógv meira.

Síðani er ein Chevrolet Styline frá 1950. Hetta er ein typiskur "amerikanari". Teir vóru vanligir í Føroyum í fimmtiárunum, og nógvir vórðu nýttir til hýruvognar.

Tann fínasti bilurin, sum ber av øllum, hvat marglæti viðvíkur, er ein Bentley SII frá 1960. Bentley er í roynd og veru ein Rolls Royce – tí síðani 1931 hevur Rolls Royce átt Bentleyverksmiðjuna, sum fór á húsagang eftir Wall Street krakkið í 1929.